Hugleiðingar um Varmakelduleitið

Fyrst skal sigast, at orðið í yvirskriftini, Varmakelduleitið, ikki er at finna í orðabókini, hetta er eitt orð, sum gjørt er til hesa greið. Síðan skal gerast vart við, at áðurnevnda navn ikki er eitt staðarnavn, sum t.d. Hagaleitið ella Akraleitið, men leiti í merkingini tíð, bil, mund, t.e. um Varmakeldutíðina.

Orð sum t.d. Summarsólstøður, hásummar, hádimmi, pollamjørki, surk, sirm og stilli eru vanlig orð við eini vanligari merking, sum tú finnur í orðabókini — fjala hesi orð eina djúpari merking í sær, eina innari, djúptøknari næstan demoniska merking. Hesi orð hava tann eginleika, at tey kunnu broyta teg, tøla teg, um tú sjálvur vilt, tá løtan er til tað. Tú kanst lata teg taka av fótum av berum kenslum. Tað er einhvør strongur langt inni í tínum sálardýpi, á illgongdum rókum, sum darrar, tá ið rætta løtan er har. Í hesum lendi rørist og livir, her giddar ein strongur og livir eitt hjarta.

Slíkar løtur stendur tú sum tin egni áskoðari ella eygleiðari, tú skoðar teg sjálvan, tú kannar teg sjálvan, tú ert á ferð á ótroddum gøtum á fremmandum leiðum. Hesa rókina innan í tær sjálvum hevur tú ikki gingið áður, tú vísti valla, at hon var til.

Knappliga stendur tú oman fyri gerandisdagin við sínum knossi og strevi og lítur at og letur hugin fara avstað við tær. Tú letur hugin leiða teg og fert á kanningarferð inn í tín egna órannsakaða heim, og tú kannar »huga tins brøttu bjargaleiðir«.

Orðini anga. Tey anga av sumri. Kanska ikki av sumri og sól, heldur av sumri og sirmi ella sumri og surki. Skalt tú fáa gleði av teimum, mást tú ikki stríða ímóti ella andøva tað minsta, tú skalt lata kenslurnar fara avstað við tær ta stund, henda sæla varar við. Orðini eru sum døgg, sum døggperlum á stráum. Tær eru so ørfinar, so sartar og tola einki av. Tær eru fullar av vætu og kenslum. Tær renna í hug orð og reglur úr ymsum søngum: nú nemur náttin við smæru, sum tað er fjálgt og lýtt í nátt, einki er sum summarkvøld við strendur. Hetta er alt so fint, inniligt og sart og vakurt. Tú fært teg nóg illa at trúgva, at deyðilig menniskju kunnu yrkja og orða so vakurt; fólk, sum hoyra hetta ella lesa kunnu ikki annað enn lata seg taka av fótum kensluliga eitt andarhald, ti hetta er so avbera *føroyskt*. Hvussu kunnu hesi fólk vita so neyvt, hvat ið bilgist innan í okkum og raka so væl okkara innastu kenslustreingir og fáa teir at skelva so eymt?

Nú í hesum sælu summarløtum kykna nakrar av hesum kenslum uppaftur, eins og náttúran aftur vaknar og við sínum fjálggrøna líti breiðir um seg við lýkku um landið. Hetta eru dimmiorð, orð, sum fáa liv og innihald um dimmið. Hesi orð kunnu taka teg av fótum og geva tær innihald í ein annan heim, ein heim, sum ikki er av hesum heimi, og sigur tú nakað, er tað brot úr føroyskum lyrikki, ti øðrvísi fært tú ikki sagt tað.

Svenskur maður spurdi meg, um føroyingar hava heitar keldur. Hvat skal ein fuglfirðingur svara aftur? Skal nakar svara ja, so er tað hann. Og tó, tað kann hann kortini ikki. Í okkara hugaheimi er tað ikki sjálv keldan, tann teskandi áarløkurin á hellúni undir Eiðinum, sum bindur huga okkara, men tað er tann mentan, tað liv, tann fólkatrúgv, sum loðar uppi við henda søgurika stað. Náttúrufrøðingurin sigur, at keldan er ein formil, CO_2, og aðrir frøðimenn kalla kelduna eitt av teimum sonevndu »elementunum«. Varmakelda er annað og meira enn ein lítið ella kanska einki sigandi formil. Hon er liv, hon er sjálvt livið. Varmakelda kundi fyri tað eins væl verið ein steinur í haganum ella eitthvørt annað. Hon er fólkið, fólksins hugsan, siðir, mentan. Staðið her á hesi slyggjutu helluni undir Eiðinum er karmurin um hendan partin av fólksins náttúru og hugsan, men tað, ið hevur týdning, er tað liv, ið nørdist og rørdist kring kelduna. Tað var sjálvt livið, ið veldi upp úr kelduni og fann góð gróðrarlikindi í fólkinum. Fólkið og náttúran var eitt, fólkið var ein partur av náttúruni og náttúran var ein partur av fólkinum. Her nørdist sjálvur livsneistin.

Higar leitaði fólk sær at vinna sær heilsubót, tey leitaðu út um bygdargarðarnar, út um alt tað, sum bant hugin til henda forgeingiliga heim. Tey vístu lekidómur lá í kelduni á Jóansøku, og tey vitjaðu hana trúliga — og vóru grødd. Teir gomlu góvu sær stundir til slíkt — vælsignaðir veri teir fyri tað. Hetta vóru stundir, sum bóru upp um gerandisdagin, upp í hæddina. Høvdu teir ikki givið sær stundir til hesar vøkru útferðir, vóru vit ikki tað fólk, sum vit í dag eru. Hvør sigur tað betur enn Hans Andrias:

tó móti hæddum høgum
hvor yrkisdagur bar,
ti tykkar strev og stinni
tað slokti hungursbrand,
og tykkar ríka sinni
tað bygdi hetta land.

Hans Andrias hevur eisini eina yrking um Varmakeldu, sum hann yrkti í 1922. Har málar hann við fáum, vøkrum og sera kensluligum orðum eina summarmynd, ið er sum høgd í krystall, og sum sigur meira enn mangir litfagrir málningar og mangar tjúkkar bøkur:

Á Varmakeldueiði um
dimmið brunnu bál.

Um alt tað, sum vit í dag kunnu siga, var teirra mentan, men sum hjá teimum var ein sjálvsagdur lutur, sigur Hans Andrias:

Har kendist høgt at lofti
og langt á óndskapsmið ..
tey
tóku upp í lógvan og
drukku heilsubót.

Eg fari at enda hesar fátæksligu reglur við næstseinasta ørindi av nevndu yrking. Hon sigur so ómetaliga nógv og ber so nógv í sær av livsvísdómi sagt á ein so fyndugan hátt, at tað er bara Hans Andrias, sum kann gera tað so væl:

Sjá, grasið grør í dølum og loft er fagur blátt —
tað ber ímóti sumri og jóansokunátt.
Mær leingist tí at skoða mín arma, mødda fót —
á Varmakeldueiði eg vinni heilsubót.

DIMMILUNDI